TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 27. februar 2025 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina fyri  Tórshavnar kommunu, soleiðis at krøvini til løðistøðir verða herd, í samband við bygging og umvæling.

Uppskotið snýr seg um at broyta ásetingar fyri parkering, soleiðis at krøvini lýst niðanfyri framyvir vera galdandi:

| Slag av bygningi | Krav |
|---|---|
| Nýggjur íbúðarbygningur við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Fyrireiking av innleggingum til øll parkeringsplássini |
| Nýggjur bygningur, sum ikki er íbúðarbygningur, við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av parkeringsplássunum |
| Størri umbygging av íbúðarbygningi við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Innlegging til øll umvældu parkerings-plássini |
| Størri umbygging av bygningi, sum ikki er íbúðarbygningur, við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av umvældu parkeringsplássunum |

Tilfar, sum lýsir uppskotið um broyting av almennu byggisamtyktini, liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 10. mars 2025 til 21. apríl 2025.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast til Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 21. apríl 2025.